Kappingarráðið

## Til kunningar

P/f Fastogn hevur við gildi frá 25. september 2008 fráboðað Kappingareftirlitinum, at P/f Føroya Lívstrygging hevur yvirtikið 50% av partabrøvunum í P/f Fastogn.

Yvirtøkan var fevnd av ásetingunum um samanleggingar, sbrt. Kappingarlógini § 13, stk. 1, nr. 1. Fráboðanarskylda var, tí minst tvær av fyritøkunum høvdu ein umsetning í Føroyum, ið lá omanfyri 4. mió. kr., sbrt. § 14, stk. 2, nr. 3. Luttakandi fyritøkurnar høvdu ein samlaðan umsetning, sum lá omanfyri 75. mió. kr. og tískil skuldi kannast um samanleggingin hindraði virknaðari kapping, sbrt. §15.

Áðrenn yvirtøkan var framd átti P/f SMS og Eik Grunnurin hvør 50% av partabrøvunum í P/f Fastogn. Eftir yvirtøkuna eiga P/f Føroya Lívstrygging og Eik Grunnurin hvør 50% av partabrøvunum.

Kappingarráðið hevur kannað eftir, um yvirtøkan hindrar virknari kapping við tað, at ein marknaðarráðandi støða verður skapt ella styrkist, sambært Kappingarlógini §15.

Kappingarráðið er komið til ta niðurstøðu, at yvirtøkan ikki hindrar virknari kapping, tí ongin broyting fer fram, ið hevur ávirkan á kappingina á marknaðinum. P/f Føroya Lívstrygging hevur onki annað virksemið á viðkomandi marknaði og sostatt er ikki talan um, at ein marknaðarráðandi støða verður skapt ella styrkist.

Kappingarráðið hevur tí gjørt av, at góðkenna yvirtøkuna og hevur boðað fráboðaranum frá,  at yvirtøkan er góðkend.

Kappingareftirlitið, tann 7. november 2008

Skálatrøð 20 · P. O. Box 73 · FO 110 Tórshavn · Telefon: +298 35 60 40 · Telefax: +298 35 60 55 · kapping@kapping.fo · www.kapping.fo